# Fluttu sjómann til lands

Gjáramorgunin var ein tyrla hjá íslednsku vaktar- og bjargingartænastuni eftir einum manni av einum niðurlendskum farmaskipi, sum var á veg yvir um Atlantshavið. Maðurin var vorðin sjúkur og mátti fáa læknahjálp. Niðurlendska skipið fekk boð um at sigla ímóti Vestmannaoyggjunum, og tað var 30 fjórðingar úr landi, tá tyrlan kom til tað og tók mannin of flutti hann á sjúkrahús. Morgunblaðið skrivar, at niðurlendska skipið fekk boð um at sigla ímóti landi, tí bara ein tyrlumanning var tøk. Tá so er, kann tyrlan ikki flúgva longri enn 30 fjórðingar til havs, skrivar blaðið.



# Lúsafundur

Laksalúsin er vorðin ein so mikið stórur trupulleiki hjá norsku alivinnuni, at Lisbeth Berg-Hansen, fiskimálaráðharri, hevur boðsent øllum teimum týdningarmestu fyritøkunum í alivinnuni til fundar um málið. Fundurin verður hósdagin. Ráðharrin sigur við tíðindastovuna ANB, at alararnir havt munandi størri trupulleikar av laksalús í ár enn undanfarin ár, og at summastaðni hevur avlúsing ikkið givið tað ætlaða úrslitið. Tað kann koma av, at lúsin er vorðin mótstøðufør. Tí er talan um eitt álvarsmál, sum skal loysast, sigur Lisbeth Berg-Hansen við ANB.

24. november 1859:

# 150 ár síðani »Origin of the species« var prentað

**Ein hin kendasta og mest umtalaða bókin, Origin of the species hjá Charles Darwin var prentað fyri júst 150 árum síðani**

*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Í ársfrágreiðingini hjá vísindaliga felagsskapinum »The Linnean Society« fyri 1858, stendur at lesa, at einki serligt hendi hetta árið. Men tað er ógvuliga langt frá sannleikanum, tí 1. juli í 1858 kunngjørdi Charles Darwin evolutiónsteori'ina fyri nøkrum fáum útvaldum limum í The Linneaa Society. Og hvørt ein er fyri ella ímóti teoriunum hjá Charles Darwin, so svitast ikki, at fáar teoriir hava havt so stóra ávirkan á vísindina kring heimin.

Og enn í dag, hálvaaðru øld síðani teoriin hjá Charles Darwin var prentað, kjakast fólk í hópatali kring heimin um teoriirnar hjá Charles Darwin. 12. februar í ár vóru liðin 200 ár síðani, at Charles Darwin var borin í heim, og hevur hetta árið verið merkt nógv av 200 og 150 ára døgunum hjá Charles Darwin.



*Charles Darwin*

### Noyddur at almannakunngera

Upprunaliga var tað als ikki ætlanin hjá Charles Darwin at kunngera sínar tankar tann 1. juli í 1858. Hetta hóast hann hevði skrivað eitt verk um evolutiónsteoriina í meira enn 20 ár. Charles Darwin hevði bara lagt teoriina fram fyri nøkrum av sínum bestu vinum. Ein ungur sosialistur, sum nevndist Alfred Russel Wallace noyddi Charles Darwin at almannakunngera sínar hugsjónir.

Wallace var undir einari ferð til Indonesia og Malaysia komin til somu niðurstøðurnar, sum Darwin hevði í evolutiónsteoriini. Wallace skrivaði sínar hugsjónir niður í eitt bræv, og sendi brævið til Charles Darwin í Onglandi. Samskifti við Alfred Russel Wallace førdi til, at ein minniligur fundur var hildin í The Linnean Society í London, har handritini hjá Charles Darwin og Alfred Russel Wallace vóru lisin upp fyri teimum, sum vóru til staðar. Aftaná minniliga fundin, fór Charles Darwin í holt við at skriva eina bók, sum var greidd til prentingar heystið í 1859. Og fyri júst 150 árum síðani kom bókin á gøtuna í Onglandi.

### Nógv kjak

150 ára gamla bókin elvir enn til nógv kjak kring allan heimin. Kristnir "kreationistar", Inteligent Design -viðhaldsfólk stríðast ímóti teoriunum hjá Charles Darwin, bæði í skúlum og á internetinum. Men tað eru ikki bara kristin, sum eru ímóti evolutiónsteoriina hjá Charles Darwin. Protestantar, katolikkar, muslimar og jødar stríðast allir ímóti evolutiónsteoriini.

Størsti parturin av kjakinum fer fram á internetinum. Nógvir vísindaligir stovnar og lærdir háskúlar kring heimin hátíðarhalda 150 ára dagin fyri bókini hjá Charles Darwin. Seinastu árini er kjakið vorðið enn meiri litríkt. Ein nýggjur bólkur er komin fram, sum nevnir seg "kristnir darwinistar", fólk sum vilja foreina eina gudstrúgv við evolutiónsteoriina. Í gjárkvøldið var kjak í ungdómssendingini, Refleks hjá Heimamissiónini á Rás2.

Kjakið var millum kreationistin, Eivind Mouritsen, og Arna Zachariassen, sum er við í felagsskapinum "Dialogos", sum er ein felagsskapur fyri kristnar, føroyskar darwinistar. Kreatonisman er nú ikki longur ein kristin eindarmentan í Føroyum. Darwin fer óivað at øsa, arga, frøða og gleða nógv fólk tey næstu 150 árini, eisini í Føroyum.



# Góðkent sum fyristøðufelag í Grønlandi

**Faroe Petroleum boðar í morgun frá, at felagið er góðkent sum oljufyristøðufelag í Grønlandi í sambandi við fyrireikingar til umsøknir um leitiloyvi í Baffin Víkini**

OLJUVINNA
*Tíðindaskriv*

Leitiumsóknir skulu latast myndugleikunum í Grønlandi í mai mánaði 2010.

Økið liggur norðan fyri Diskovíkina, har leitiloyvir vórðu latin í 2007 til oljufeløg so sum Cairn Energy, Chevron og Exxon. Økið, sum verður bjóðað út, er 151.358 km², og er býtt sundur í 14 blokkar. Seinastu árini er nógvur seismikkur skotin yvir økið. Níggju slíkar seismiskar kanningar eru tøkar, sum fevna um 21.257 km².

At Faroe Petroleum nú er góðkent sum fyristøðufelag, er partur av ætlanini um møguliga at søkja um leitiloyvi í Grønlandi. Treytirnar í sambandi við útbjóðingarumfarið eru líkar teimum, sum eru galdandi í Norðsjónum. Skattligu viðurskiftini fyri oljuframleiðslu líkjast viðurskiftunum í Bretlandi og Føroyum, og verða sum heild mett at vera jalig.

U.S. Geological Survey stovnurin metir, at vestur Grønland, sum Baffin Víkin er partur av, fjalir upp til 18 milliardir tunnur av olju í undirgrundini, og tað arktiska økið sum heild, ið Grønland er ein partur, verður mett at fjala ein fjórðing av heimsins kolvetnum, ið enn ikki eru funnin.

Grønland er ein náttúrligur partur av vakstrarøkinum hjá Faroe Petroleum, sum fokuserar uppá oljuleiting á nýggjum leiðum, so sum í Føroyum og Barentshavinum.



Lesið Sosialin so eru tit við